# eftir góða býnum

*Hóast Vágsbotnur ikki er so nógv í fokus hjá Tórshavnar kommunu sum onnur støð í miðbýnum, so verður staðið ferð eftir ferð drigið fram av arkitektum og geografum sum tað mest upplagda staðið at skapa eitt savnandi torg í Tórshavn. Men hvussu so við ferðsluni?*



fleiri fólk ynskja at búgva har, og harvið vilja húsaprísirnir hækka.

Men Gilli Trónd vísti á, at slík øki sjáldan eru øki, har marknaðarkreftirnar sleppa at ráða, men hinvegin øki, ið verða planløgd soleiðis, at meiri lív kemur í og at økið verður meiri hugnaligt. Millum annað kunnu snotuligir bátahavnir vera við til at økja um prísin á bústøðunum í grannalagnum, snøgt sagt tí at ein snotulig bátahavn skapar vakurleika og hugna í umhvørvinum.

### Øki at savnast á

Men hvussu skal man skapa hugna í einum býi? Gilli Trónd helt, at fríøki eru nakað, ið Tórshavn eigur at satsa nógv meiri upp á. Í dag liggja ein rúgva av traðum kring um í býnum, ið møguliga eru vakrar fyri eyguni, men annar einans eru til gagns fyri ross, seyð og gæs. Hann mælti til, at kommunan í størri mun fór at gagnnýta hesi grønu økini til at skapa fríøki og býarparkir.

Hann vísti á, at fríøki eru ein týðandi partur av einum nútíðar býi, at fríøki eru sosial savningarstøð í býnum og at tey eisini geva íbúgvunum betri møguleikar fyri uttandura lívi.

Men eisini er neyðugt at arbeiða meiri miðvíst við at skipa torg, ið hava líknandi funktiónir sum fríøkini. Í dag er frægasta torgið í Tórshavn í SMS, men annars skal sigast, at Vágsbotnur, har millum annað Sosialurin heldur til, vanliga verður mett sum økið við størsta torg-potentialinum í býnum.

Tað, ið hevur týðning er, at hetta býarrúmið, ið í dag verður nýtt sum partvíst eitt gjøgnumkoyringarrúm, partvíst sum gongurúm og partvíst sum parkeringsrúm, verður umskapað til eitt "stað", har fólk síggja fram til at "dvølja" eina løtu. Tað skal tó nevnast, at tað er ein spíri at hómast mótvegis eini slíkari "staðargerð" av Vágsbotni, nevniliga hugnaliga terassan frammanfyri Hvonn Brasserie.

Hendan terassan skapar ikki einans eina virðisøking fyri Hvonn, men skapar eisini óbeinleiðis "positivar eksternalitetir" – eitt óbeinleiðis meirvirði – til grannarnar í økinum, bæði tí at tænastan er har, men eisini tí at Hvonn er eitt tað kendasta "staðið" í Tórshavn í dag – millum yngri fólk kanska kendari enn Vágsbotnur sjálvur. Eitt "stað" er ikki einans ein spurningur um eitt avmarkað fysiskt rúm, men somuleiðis um hvussu fólk ímynda sær hetta rúmið sum eitt stað.

### Bilarnir og fótgangararnir

Men Vágsbotnur hevur ein stóran trupulleika, ið samstundis er ein fyrimunur: Har er rættiliga stór ferðsla. Tað sama er galdandi á Dr. Jakobsens Gøtu, Tórsgøtu og fleiri øðrum gøtum í miðbýnum í Tórshavn: Miðbýurin er ein ævigur dystur millum bilar og fótgangarar, og kemur tað til skarpskeringar vilja fótgangararnir vanliga vera við undirlutan.

Tað var rættiliga breið semja millum arkitektarnar, ið vóru savnaðir til fyrilesturin, um, at høga talið av bilum er avgerandi trupulleikin við Tórshavnar miðbýi. Aftaná fyrilesturin hjá Gilla Trónd var eitt pallborðskjak, har nógv áhugavert var uppi at venda. Við pallborðið sat m.a. býararkitekturin í Tórshavnar kommunu, Mikael Viderø, ið nevndi møguleikan fyri at skipa øll tey spjøddu parkeringsplássini í miðbýnum í eitt ella fá sentral parkeringsøki. Hann metti, at ein fittur partur av ferðsluni í miðbýnum eru fólk, ið leita eftir fríum parkeringsplássum. Um einans eitt parkeringsøki var, vistu fólk hvar tey skulu fara, og harvið kundi ferðslan verið minkað munandi.

Tað, ið tó ongantíð kom fram, er hvar eitt tílíkt risaparkeringspláss skal vera. Um bygningar verða bygdir á Skálatrøð, so er mest upplagda staðið horvið, samstundis sum parkeringstørvurin hevur vaksið seg uppaftur størri.

### Hvat vil man við miðbýnum?

Tað stendur ikki reiðiliga greitt hvat man ynskir við Tórshavnar miðbýi. Summar røddir ynskja menning, aðrar varðveiting. Loysnin skal helst finnast onkustaðni mitt ímillum, men tað kann gerast sera trupult at finna hendan gylta millumvegin.

Partvíst ynskir man minni ferðslu, men fyritreytin fyri menning er jú ferðsla – antin talan er um bleytar ella harðar trafikantar. Atkomuleikin er jú tann parturin av góðleikunum í býnum, ið fáa allar hinar góðleikarnar at hanga saman. Ivi er sáddur um framtíðar parkeringsviðurskiftini, eins og eingin loysn er í eygsjón til hvussu man endaliga fær bilbukt við bilferðsluni í miðbýnum. Ókeypis býarbussar eru ein góð roynd, men ivaleyst má arbeiðast við at finna ein avloysara til Vágsbotn og Steinatún, tá ferðslan millum Eysturbýin og Vesturbýin skal avgreiðast. Summi nevna ein innara ringveg, meðan onnur nevna ein undirsjóvartunnil undir Havnar vág.

Men um ikki politikararnir vilja taka støðu til at loysa yvirskipaða ferðslutrupulleikan, so er spurningurin, um man ikki bara eigur at umskipa miðbýin til bústaðarøki og lata handlar og stovnar flyta niðan í aðrar býlingar, ið hava meiri pláss.

### Býaratlas á breddanum

Annars skal nevnast, at leingi væntaða býaratlasið hjá Tórshavnar kommunu kemur út 21. november. Tá verða góðar fyritreytir fyri einum breiðari kjaki um hvussu man ynskir at menna Tórshavn miðbý og hvørjar bygningar man ynskir at friða.